# Føroyar missa í samráðingum



**Føroyska toskakvotan í russiskum sjógvi verður eftir nýggja sáttmálanum millum londini eini 2.000 tons minni enn í 2004, og hýsukvotan minkar 380 tons**

FISKIVEIÐI-SAMRÁÐINGAR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskiveiðisamráðingar millum Føroyar og Rusland vóru í Kaliningrad, 9. og 10. desember.

Fiskimálaráðið sigur, at samráðingarnar hesaferð vóru merktar av, at føroyska makrelkvotan fyri 2005 verður 23% minni enn í 2004, samstundis sum russisk skip ikki hava fiskað alla sína svartkjaftakvotu upp á 200.000 tons í ár. Tí høvdu russar heldur ikki so stóran áhuga fyri eins stórari kvotu fyri komandi ár.

– Henda støða førdi til, at ikki var møguligt at varðveita sama støði í nýggju avtaluni sum í avtaluni fyri 2004.

Úrslitið av samráðingunum gjørdist tí, at partarnir samdust um at gera eina avtalu fyri 2005, sum er á einum lægri støði enn avtalan fyri 2004.

– Fiskiveiðimøguleikarnir hjá flakatrolarunum í russiskum sjógvi í 2005 verða tó væl betri enn árini undan 2004, sigur Fiskimálaráðið.

Føroyska toskakvotan í russiskum sjógvi verður eftir nýggja sáttmálanum eini 2.000 tons minni enn í 2004, og hýsukvotan minkar 380 tons.

– Hinvegin fáa vit 1.000 tons av flatfiski, so samlaða botnfiskakvotan verður eini 1.400 tons minni í 2005 enn í 2004.

Fiskimálaráðið sigur, at russiska svartkjaftakvotan minkar úr 203.300 tonsum niður í 160.000 tons, og makrelkvotan minkar úr 8.600 tonsum niður í 7.000 tons

– Bæði Russland og Føroyar hava sum heild gagnnýtt sínar fiskiveiðimøguleikar í fiskiveiðiavtalunum seinastu árini.

## Vinnuligt samstarv

Á fundinum í Kaliningrad umrøddu Føroyar og Russland eisini møguleikarnar fyri vinnuligum samstarvi millum londini bæði.

– Vit tosaðu um møguleikarnar hjá føroyskum skipum at útvega sær fiskiveiðimøguleikar á annan hátt enn gjøgnum fiskiveiðiavtaluna. Vit skutu upp, at karmarnir rundan um tílíkt samstarv verða lagdir í eina fastari legu, og í hesum sambandi varð fundur avtalaður at verða í mars 2005, sigur Fiskimálaráðið.

Í føroysku samráðingarnevndini vóru Andras Kristiansen, deildarstjóri sum samráðingarleiðari, Ulla S. Wang, fulltrúi, Jóhan Simonsen, fulltrúi, Kaj P. Mortensen, ráðgevi á Løgmansskrivstovuni, Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur, Ólavur Petersen, Hanus Hansen og Mortan Johannesen, umboðandi Føroya Reiðarafelag, Árni Olafsson, ráðgevi í føroyskum viðurskiftum í danska uttanríkisráðnum og Bo Aaborn frá Færøernes Kommando.

---

sóni, sum teir semjast um, meta um skipanina og koma við uppskoti um víðari gongd. Metingarstøð ið er, um støddarflokkingin hevur viðvirkað til, at meira er virkað í Føroyum, og um støddarflokkingin hevur givið hægri prís/ vinning.

5) Serstøður sum t.d. í løtuni við upsa, har skip bjóða fisk alment til sølu í Føroyum og einki veruligt boð fæst, hvørki frá føroyskum ella útlendskum fiskakeypara, kunnu loyva beinleiðis landing uttanlands og/ ella flutningi beinleiðis úr Føroyum. Nevndin, sum er nevnd í pkt. 4, skal útgreina nærri, hvat hugtakið »veruligt boð« merkir. Hetta er treytað av, at fiskurin er boðin út av góðkendari uppboðssølu, ið váttar yvirfyri avvarðandi myndugleika, at einki boð er fingið fyri fiskin. Hetta verður ikki ávirkað av avmarkingarhámarkinum um landing beinleiðis uttanlands (sí stk. 10), men fylgir annars øllum hinum ásetingunum.

6) Aðrar serstøður eru, tá ið virkini ikki kunnu keypa/ virka fisk, sum t.d. orsakað av frítíð og verkføllum kunnu loyva beinleiðis sigling til útlendskan marknað. Endaligt loyvi krevst av avvarðandi myndugleika. Hesar serstøður við fiskinum verða ikki ávirkaðar av avmarkingar-hámarkinum um landing beinleiðis uttanlands (sí stk. 10), men fylgja annars øllum hinum ásetingum.

7) Fyri at tryggja virkjunum eina javna tilgongd av fiski, bestu góðsku og skipunum besta prís, verða upplýsingar um øll viðkomandi veiðitøl samskipað av góðkendari uppboðssølu, sum sendir tær til allar áhugaðar fiskakeyparar.

8) Samstundis verður heitt á Fiskimálaráðið um at gera nýggjar reglur um uppgerð av fiskidøgum, sum eggja skipunum at gera styttri túrar.

9) Veiðifør, sum ikki eru partar av fiskidagaskipanini, koma undir allar ásetingar, tó við teimum undantøkum, ið nevnd eru undir pkt. 10.

10) Skip, sum eru í beinleiðis veiði eftir fiskasløgum, sum stinglaksi, langasporli, hávi, kikarafiski við meira, og sum tað ikki finnast fiskakeyparar til í Føroyum, verða undantikin ásetingunum, ið nevndar eru, á túrum, tá ið nevndu fiskasløg eru meira enn 50% av veiðini. Arbeitt eigur at vera fyri at menna virkingina á landi í Føroyum av hesum fiskasløgum, soleiðis at skaptar verða fyritreytir fyri, at frægastu marknaðarprísir eisini kunnu fáast fyri hesi fiskasløg.

11) Mælt verður til, at parturin, sum kann landast beinleiðis uttanlands, verður 25% fyri hvørt triðingsár, og at mótrokningin fyri landingar omanfyri hetta, verður sum nú við fiskidøgum fyri tey skipini, sum eru í fiskidagaskipanini. Fyri tey skip, sum ikki eru partar av fiskidagaskipanini, verður kravt eitt avgjald svarandi til í mesta lagi 30% av søluvirðinum av tí nøgd, ið avreidd er ov nógv uttanlands í útrokningartíðarskeiðinum.

12) Nevndin í pkt. 4, ið metir um skipanina, skal eisini meta um skipanina í síni heild og vísa á trupulleikar og uppskot til loysnir.

Myndugleikarnir og vinnan eiga miðvíst at arbeiða við at menna kappingarførið í høvuðsvinnuni við at:

a. Menna logistikkin úr Føroyum til marknaðin

b. Menna logistikkin innanlendis í Føroyum við at avtaka kappingaravlagandi reglur so sum, at skip undir FAS ikki kunnu sigla frakt millum oyggjarnar

c. Stuðla felags sølu og marknaðarføringstiltøkum til frama fyri alla vinnuna

d. Stuðla undir framleiðslu av alternativum fiskasløgum, og at øll rávøran verður gagnnýtt á bestan hátt

e. Stuðla vinnugransking innan veiði-, reiðskaps-og framleiðslutøkni.

Tilmælið er undirskrivað av Føroya Ráfiskaseljarafelag, Føroya Fiskimannafelag og Føroya Ráfiskakeyparafelag.



*Sum formaður í Ráfiskaseljarafelagnum noyðist Árni Joensen at samansjóða mong ymisk sjónarmið, og tað hevur víst seg at verið léttari sagt enn gjørt*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Egil Olsen er formaður í Ráfiskakeyparafelagnum, og har draga flestu limirnir somu línu. Tilmælið hjá seljarum og keyparum byggir á millumloysnir*

*Mynd: Jens Kr. Vang*